


LÍVLIGT

*Tey síggja so troytt út, børnini. Tað hevur helst sína orsøk, tí tey hava verið virkin allan dagin her í Brúsa*



# Rokast til jóla í Leirvík

**BØRN** Nú tað stundar til jóla, eru vit í Brúsa komin í jólahýri. Í ár royna vit nakað heilt nýtt og spennandi - jólaverkstovur.

**Leirvík:** Vit hava fimm ymiskar verkstovur og børnini verða deild upp í bólkar, við børnum úr øllum fimm stovunum. Hesir bólkar ganga so á skift millum verkstovurnar í fimm dagar. Á hvørjari verkstovu verða fýra starvsfólk.

Vit møtast hvønn morgun klokkan 9:30 í Miðstovu, har vit syngja jólasangir saman og fara síðani í bólkar og út á verkstovurnar. Har eru vit frá kl. 10:00 til kl. 11:30

Seinnapartin hava vit vanligan dag.

Ein dag fara vit at bjóða foreldrum til jólahugna í Limmilund, ella á stovunum – alt eftir hvussu viðrar.

Hósdagin 16. desember fara børn og starvsfólk at hava jólahald saman. Vit fara at hugna okkum, dansa um jólatræið og eta ein góðan jóladøgurða.

Vit taka myndir hvønn dag á ymisku verkstovunum og hesar eru at síggja í Miðstovuni.

1. desember settu vit jólatræið upp í Miðstovuni og børnini pyntaðu tað. Í ár verður træið pyntað við einglum.



SØTUR BITI

*Orðatakið sigur, at "søtur er sjálvgivin biti". Hesi eru farin undir at baka til stóru jólahátíðina, ið stendur fyri framman*

## Fimm jólaverkstovur

Íalt eru fimm jólaverkstovur í Brúsa í Leirvík. Tær eru hesar:

1. **Limmilunda verkstova**, har vit gera pynt til at heingja upp í Limmilund.
2. **Baki verkstova**, har vit bakað jólakøkur, ið børnini síðani fáa heim við.
3. **Jólagávu verkstova**, vit gera jólagávur til mammu og babba
4. **Jólapríðis verkstova**- gera vit jóladekoratiónir
5. **Leita** eftir jólamanninum í Limmilund